# motorveg



*Fólkatalið á Selatrað er nógv minkað tey seinastu árini. Verður vegasambandi dagført vóna fólk í bygdini at fólkatalið fer at vaksa aftur – og ikki minka, soleiðis sum fólk kanska kunnu illgita. – Tað harmar meg at fólkatalið minkar, sigur Sanna Andreasen*

komið fyri, at bilar eru farnir útav vegnum, kortini uttan at stórvegis skaði er hendur. Men tað er kanska meiri "lukkan enn forstandurin" sum er orsøkin til tað.

Vegurin verður sjálvandi ruddaður av Landsverki á vetri, men sum skilst á fólki á Selatrað er henda ruddingin ikki nóg góð. Á øðrum fólkum skilst, at orsøkin til hetta er hin einfalda, at menn fáa snøgt sagt ikki ruddað vegin, tí at hann er so vánaligur.

Oljubilurin skal eisini av og á til bygdina at fylla í tangarnar hjá fólki. Men her er "skipanin" hon, at boða veðurmenninir frá høgætt og kava, ja, so kemur oljubilurin áðrenn fyrsta følvið legst.

Í hesum seinasta kavanum merktu tey enn einaferð fylgjurnar av tí, at kavi og ísur lá framvegis á vegnum. Ein fylgja av hesum var, at tað var ikki koyrandi hjá ruskbilinum, og tí varð einki rusk heintað í bygdini í fleiri vikur eftir jól.

- Teir vóru her í farnu viku, og var tað fyrstu ferð síðani á jólum at vit sluppu av við ruskið. Bara tað, at teir ikki tora at koma norður til okkum, sigur nóg mikið um hetta vegastrekkið, slær Sanna Andreasen fast.

Á sumri er Selatrað eitt nógv vitjað stað hjá føroyskum og fremmandum ferðafólkum. Her koma mangan stórir bussar við ferðafólkum, eins og fólk við jøvnum millumbilum vitja skótadepilin í bygdini.

Nú ætlanin er at víðka um virksemið her, er eingin ivi um at ferðslan bara fer at økjast enn meiri í framtíðini.

## Long tíð – einki svar

Tað kom nakað óvart á Sannu at hon varð vald inn í bygdaráðið á seinasta vali. Hon er á mangar mátar at meta sum ein talsmaður fyri fólkið á vestaru síðu í Sjóvar kommunu.

Spurningurin er, hvat hon sjálv hevur gjørt fyri at bøta um umstøðurnar við ferðasambandinum hjá fólkinum í bygdini, har hon býr.

Hon hevur tosað við borgarstjóran, Artur Johansen um málið, og hann skuldi síðani taka tað upp við tey hjá Landsverki.

Trupulleikin er bert hann, at viðgerðin gongur so seint og tað er so leingi at fáa eitt endaligt svar. Sanna undrast á, hví tað skal ganga so seint fyri seg.

- Eg vóni sjálvandi ikki, at nakað álvarsamt fer at henda í ferðsluni, tí – eg meini so við – skúlabørnini á Selatrað fara hvønn dag við bussi út á Strendur. Men her er kortini tað góða, at um líkindini ikki eru til vildar, - ja, so kemur bussurin ikki.

- Eg havi eisini sjálv onkutíð ringt til teir, tá eg eri farin til arbeiðis og havi rátt teimum frá at koma higar, tí tað er púra ørt at koyra, sigur Sanna Andreasen.

> *"Eg havi eisini sjálv onkutíð ringt til teir, tá eg eri farin til arbeiðis og havi rátt teimum frá at koma higar, tí tað er púra ørt at koyra*
>
> (Sanna Andreasen)

# Breiðka í smáum



*Við ávísum millumbilum – serliga við ársenda – verða onkur hissini arbeiðir gjørd fyri at breiðka vegin til Selatraðar. Hetta bøtir sjálvandi um farleiðina, men er ikki nóg mikið hjá fólki. – Vit ynskja ein breiðan og góðan veg, sigur Sanna Andreasen av Selatrað*

At vegastrekkið hevur ligið soleiðis, er ikki farið aftur við borðinum á bygdarfólkinum ella teimum sum brúka vegin nógv.

Ein teirra sum íðin hevur tosað fyri at gera nakað við hetta, er busseigarin Henry Jarnskor av Strondum. Hann hevur mangan sagt frá síni hugsan um hetta vegastrekkið.

Og her í blaðnum hava m.a. ein núverandi og ein fyrrverandi bygdaráðslimur á Strondum – Sonni Johansen og Meinhard Jacobsen – samsinstir sagt frá, hvussu neyðugt tað er at okkurt verður gjørt við henda vegin.

Okkurt er kortini gjørt á leiðini. Í fleiri støðum er vegurin breiðkaður til hóskandi breidd. Men ikki fyrrenn hetta er gjøgnumført á øllum teim níggju kilometrunum er talan um ein góðan og tryggan veg.

Sambært fólki á Selatrað vísir tað seg, at tey fáa tær seinastu krónurnar sum Landsverk eigur til vegagerð á hvørjum ári: Tá tað fer at nærkast ársenda, verður tøkur peningur so at siga bert tveittur í Selatraðarvegin.

Tey eftirlýsa tí eina ætlan fyri hetta vegastrekkið, eins og Heildarætlanin 2008-2020 hjá Landsverki hevur víst á. Her varð eitt av uppskotunum at umvæla og breiðka vegin fyri millum 2 og 4 mió krónur, soleiðis at farleiðin varð hóskandi til ferðsluna í dag. Dentur varð lagdur á, at hetta var ein umráðandi verkætlan.

Í hesi ætlanini er eisini ein ætlan gjørd um tað samlaða vegastrekkið. Sambært hesum skal arbeiðið gerast í árunum 2016 til 2019 og skal tað kostar 15 mió krónur.

Tann stóri spurningurin er kortini, nær hvør av hesum ætlanum verður sett í verk.